# Sumba sleppur ikki málinum

**Sumbingar vilja ikki góðtaka, at AB-leikari fekk leikloyvi undan seinasta vikuskifti, tí upplýsingarnar hjá FSF í málinum hava ikki verið rættar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum vit skrivaðu í týsdagsblaðnum, so fór tað ikki so stillisliga framvið, tá AB leygardagin vann 2-0 á Sumba. Ein av málskjúttunum í dystinum var Tom Iburg, og tað er júst hetta navnið, sum eftir dystin elvdi til eftirspælið.

Sumbingar vildu fyrst vera við, at leikarin ikki hevði leiklloyvi. Hetta tí AB ikki fyrr enn 12. august bað FSF um leikloyvið, og tí hetta í fyrstu syftu varð sýtt felagnum.

Hjá FSF varð eisini váttað, at soleiðis hevði verið í fyrsta umfari, men eftir at hava kannað málið nærri, varð leikloyvið kortini útskrivað, hóast farið var út um 10. august, sum vanliga er evstamarkið at skifta felag.

Fótbóltssambandið grundaði sína avgerð á, at talan ikki var um at skifta felag. Hetta tí leikarin hevði verið búsitandi í Danmark seinasta árið, og tá so er, fellur gamla leikloyvið burtur. Tað vil við øðrum orðum siga, at leikarin ikki skifti úr B36 til AB, men at hann varð knýttur beinleiðis at AB.

## Skeivir upplýsingar

Hesar grundgevingar vilja sumbingar tó ikki góðtaka soleiðis uttan víðari. Sambært teimum upplýsingum, sum teir hava fingið, so hevur leikarin alla tíðina verið búsitandi í Føroyum. Í øllum førum á pappírinum, og tað má vera tað, sum telir, halda teir.

– Skrásetti bústaðurin hjá leikaranum hevur alla tíðina verið í Føroyum. Um hann hevur verið í Danmark eitt tíðarskeið ella ikki, er fullkomuliga órelevant í hesum førinum. So skuldi allur hópurin hjá okkum verið ólógligur, tí vit vóru á venjinarlegu í Danmark í summar, tó at leikararnir framvegis vóru búsitandi í Danmark. Vit hava so ikki endurnýggja spæliloyvið, síðani vit komu heimaftur, men skal hetta vera reglan, so fall leikloyvið burtur, tá vit fóru av landinum, sigur Torri Thomsen úr Sumba.

– Tí vilja vit ikki finna okkum í, at hetta málið bara sleppur at fara framvið borðinum. Reglurnar fyri leikloyvi eru annars hampuliga greiðar, og sjálvir hava vit fingið noktandi svar, tá vit ætlaðu at fáa okkurt leikloyvið avgreitt eftir 10. august. Tað er sum so í lagi, men reglurnar mugu vera líka fyri øll. Tað er tað, sum vit vilja hava sligið fast, sigur Torri, áðrenn hann at enda leggur afturat.

– Tað einasta vit vilja hava, er fair-play. Tað er eitt hugtak, sum so nógv hevur verið rópt um, men tað hava vit so einki merkt til. Spurningurin er, um vit ikki fara at vinda gula fair-play flaggið á hálva stong um vikuskiftið, tí um hetta ber til, so er tað í øllum førum eitt deytt hugtak fyri okkara viðkomandi.



*Enn er ikki vist, at AB fær stigini fyri dystin ímóti Sumba.*
*Mynd: Savnsmynd*

## Trupul viðgerð

Hóast Karl Vidtfeldt í týsdagsblaðið okkara varð endurgivin fyri at siga grundgevingarnar fyri, hví leikloyvið varð útskrivað, so ásannar Karl tó, at kappingarnevndin sjálv ikki hevði tikið støðu til sjálva kæruna hjá Sumba.

Á flogvøllinum undan fráferðini til Skotlands fingu vit orðið á hann, men tað var tó ikki tað stóra, sum hann hevði at siga um málið í løtuni. Ikki annað enn tað, at nevndin hjá FSF hevur fund í Skotlandi hósdagin, og at kæran hjá sumbingum fær sína viðgerð her.

Hvussu er og ikki, so er einki at ivast í, at viðgerðin av málinum kann geva FSF trupulleikar. Tað er nevnliga so, at í viðmerkingunum til kappingarreglurnar stendur, at um felag hevur fingið leikloyvi útskrivað, so er hetta galdandi. Hetta tí tað ikki skal lastast felagnum, um FSF hevur gjørt mistak hesum viðvíkjandi.

Tí kann FSF neyvan geva sumbingum viðhald í kæruni uttan víðari. Er talan tó um, at leikloyvið er givið, grundað á skeivar ella villeiðandi upplýsingar frá søkjandi felagnum. Er tað rætt, sum Sumba førir fram, so kann kæran undir ongum umstøðum avvísast, men hinvegin ber illa til at geva fult viðhald. Ein møgulig loysn kundi kanska verið, at leikloyvið hjá leikaranum verður tikið aftur, og at felagið fær eina revsing, men tá er spurningurin framvegis, hvat skal henda við dystinum, AB-Sumba. Stendur AB framvegis sum vinnari, er einki at ivast í, at sumbingar kenna seg snýttar. Ein millumloysn kundi verið at ásett dystin av nýggjum, men so er spurningurin, um sumbingar vilja góðtaka at fara tvær ferðir norður um suðuroyarfjørð, ella um teir krevja, at dysturin skal vera í Sumba.

Hvørja avgerð kappingarnevndin tekur, fekst so ikki at vita fyri evstamark okkara, men undir øllum umstøðum tykist heilt víst, at hetta er eitt mál, sum fer at skapa fordømi fyri líknandi støðum framyvir.

# Glasgow fær føroyskar litir

**Sum vant ætla føroysku áskoðararnir at gera nógv burturúr**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

**Sosialurin. Glasgow:** Ein sjálvsagdur partur av landsliðsferðini er uttan iva føroyski 12. maðurin. Er tað nakar, sum er serliga ímyndin av hesum, so er tað uttan iva Regin Egholm, sum hevur verið formaður hjá føroysku áskoðarunum, síðani felagið varð stovnað.

Og skal metast eftir luttakaratalinum, so er hetta ein av teimum stóru uppgávunum hjá Regini og teimum. Bara við 12. manni eru gott og væl 200 áskoðarar teknaðir, og tá so restin av ferðalagnum verður talt við, verður talan um eina hálva føroyska útisetalegu í Skotlandi.

Longu klokkan fimm mikudagin var sølubásurin riggaður til á Flogvøllinum, og einki er at ivast í, at umsetningurin í hesum verður hampuliga stórur á ferðini, soleiðis at føroysku litirnir kunnu seta sín dám á Glasgowøkið komandi dagarnar.






# Nú byrja vit aftur!



## Venjingartíðir hjá Ljósinum 2003/04

| Lið | Dagur | Klokkan | Stað | Leiðari | Telefon |
|---|---|---|---|---|---|
| Foreldur/ børn | Mikudag | 17.00-17.45 | Komm. skúlin | Mirjam Jacobsen | 31 47 72/ 00 00 00 |
| Foreldur/ børn | Mikudag | 17.00-17.45 | Komm. skúlin | Sølvær Jacobsen | 25 78 00 |
| 4 ár | Mánadag | 16.00-17.00 | Sankta fr. skúli | Annika Djurholm | 31 59 40 |
| 4 ár | Mánadag | 16.00-17.00 | Sankta fr. skúli | Arnhild Johannesen | 31 02 47/ 26 25 65 |
| 5 ár | Mánadag | 17.00-18.00 | Sankta fr. skúli | Elin M. N.Joensen | 31 40 19/ 25 84 14 |
| 5 ár | Mánadag | 17.00-18.00 | Sankta fr. skúli | Iben Debes | 31 84 03/ 26 10 86 |
| 6 ár | Týsdag | 16.00-17.00 | Sankta fr. skúli | Gunnvá Egholm | 31 30 88 |
| 6 ár | Týsdag | 16.00-17.00 | Sankta fr. skúli | Mary Hansen | 31 97 93 |
| 1. flokkur | Týsdag | 17.00-18.00 | Sankta fr. skúli | Jóna Gunnarsson | 31 71 53/ 26 31 89 |
| 1. flokkur | Týsdag | 17.00-18.00 | Sankta fr. skúli | Julianna Mørkøre | 31 39 14 |
| 2. flokkur | Hósdag | 16.00-17.00 | Sankta fr. skúli | Krista D. Hjaltalin | 31 01 23 |
| 2. flokkur | Hósdag | 16.00-17.00 | Sankta fr. skúli | Billa J. Joensen | 31 47 50/ 26 49 13 |
| 3. flokkur | Mikudag | 19.00-20.00 | Sankta fr. skúli | Simona Mikkelsen | 31 47 34/ 25 46 38 |
| 4. flokkur | Hósdag | 18.00-19.00 | Sankta fr. skúli | Eirin Holm | 32 10 26/ 25 60 20 |
| 4. flokkur | Hósdag | 18.00-19.00 | Sankta fr. skúli | Elin Stakksund | 31 74 75/ 26 50 99 |
| 4. flokkur | Hósdag | 18.00-19.00 | Sankta fr. skúli | Rúna Højgaard | 31 68 94/ 25 60 61 |
| 5. flokkur | Hósdag | 17.00-18.00 | Sankta fr. skúli | Súsanna D.Jákupsdóttir | 31 78 54/ 26 38 63 |
| 5. flokkur | Hósdag | 17.00-18.00 | Sankta fr. skúli | Paulina Petersen | 31 23 95/ 26 03 40 |
| 6. flokkur | Týsdag | 19.00-20.00 | Sankta fr. skúli | Súsanna D. Jákupsdóttir | 31 78 54/ 26 38 63 |
| 6. flokkur | Týsdag | 19.00-20.00 | Sankta fr. skúli | Annika á Borg | 31 19 60 |
| 7. flokkur | Mánadag | 19.30-20.30 | Sankta fr. skúli | Gunvá Gray | 31 28 28/ 25 08 21 |
| 7. flokkur | Mánadag | 19.30-20.30 | Sankta fr. skúli | Asta Magnussen | 31 79 82/ 25 53 08 |
| 8.-10. flokkur | Týsdag | 20.00-21.00 | Sankta fr. skúli | Christina Isaksen | 31 50 04/ 25 80 65 |
| 8.-10. flokkur | Týsdag | 20.00-21.00 | Sankta fr. skúli | Heidi Holm | 31 36 42/ 25 46 38 |
| 18 ár og eldri | Mikudag | 20.00-21.00 | Sankta fr. skúli | Arnóra Thomsen | 31 40 25/ 26 10 80 |
| 18 ár og eldri | Mikudag | 20.00-21.00 | Sankta fr. skúli | Eyð Mørkøre | 31 25 95/ 22 88 03 |
| Motión | Hósdag | 19.00-20.00 | Sankta fr. skúli | Helle Drews | 31 01 23/ 21 56 99 |
| Motión/ avsp./ ball-stikk | Týsdag | 18.00-19.00 | Sankta fr. skúli | Lydia Arge | 31 28 29 |
| Morgunfimleikur | Mánadag | 09.15-10.00 | Háskúlin | Hjørdis Samuelsen | 31 25 38/ 21 25 38 |
| Avspenning*** | Mánadag | 18.00-19.30 | Sankta fr. skúli | Augusta Mikkelsen | 31 04 49 |
| amboð ge. 6-7 ár | Hósdag | 17.00-18.00 | Komm. skúlin | Bára Gulbein | 31 90 80 |
| amboð ge. 6-7 ár | Hósdag | 17.00-18.00 | Komm. skúlin | Malan Skorá | 31 05 16/ 25 00 95 |
| amboð ge. 8-9 ár | Hósdag | 18.00-19.00 | Komm. skúlin | Jórun Joensen | 31 06 35/ 25 88 03 |
| amboð ge. 8-9 ár | Hósdag | 18.00-19.00 | Komm. skúlin | Rannvá Poulsen | 31 82 67/ 26 50 50 |
| amboð ge. 10-11 ár | Mánadag | 17.00-18.00 | Komm. skúlin | Barbara Olsen | 31 99 13/ 25 20 39 |
| amboð ge./dr.12 ár & eldri | Mikudag | 19.30-21.00 | Komm. skúlin | | |
| amboð ge./dr.12 ár & eldri | Mánadag | 19.30-21.00 | Komm. skúlin | | |
| amboð dr. 4-6 ár | Týsdag | 17.00-18.00 | Komm. skúlin | Rannvá Nónfjall | 31 99 11 |
| amboð dr. 4-6 ár | Týsdag | 17.00-18.00 | Komm. skúlin | Julia Jacobsen | 31 02 50 |
| amboð dr. 7-9 ár | Týsdag | 18.00-19.00 | Komm. skúlin | Heri Kjelnæs | 31 70 23/ 21 70 23 |
| amboð dr. 10 -11 ár | Týsdag | 19.00-20.00 | Komm. skúlin | Aimee Hansen | 31 79 80/ 25 17 33 |
| amboð dr. 10 -11 ár | Týsdag | 19.00-20.00 | Komm. skúlin | Ivalu í Ólavsstovu | 32 12 29/ 22 51 06 |
| pinkur stórkapping* | Mikudag | 18.00-19.00 | Sankta fr. skúli | Hildigunn Norðfoss | 31 63 18/ 25 63 71 |
| pinkur stórkapping* | Mikudag | 18.00-19.00 | Sankta fr. skúli | Edith Dahl Olesen | 31 41 27/ 25 93 33 |
| smágentur stórkapping* | Mánadag | 17.00-18.30 | Eysturskúlin | Ann Hansen | 31 32 42/ 25 47 93 |
| gentur stórkapping* | Mikudag | 18.30-20.00 | Eysturskúlin | Durita Gunnarsson | 31 61 35/ 25 24 25 |
| gentur stórkapping* | Hósdag | 19.30-21.30 | Eysturskúlin | Jeanette Miné | 31 76 73/ 51 76 73 |
| kvinnur stórkapping* | Mánadag | 18.30-20.30 | Eysturskúlin | Bjørt L.Joensen | 31 74 94/ 22 88 18 |
| kvinnur stórkapping* | Hósdag | 17.30-19.30 | Eysturskúlin | Tóra Róin | 31 52 02/ 27 03 94 |
| amboð úrval I** | Fríggjadag | 17.00-19.00 | Komm. skúlin | Ann Hansen | 31 32 42/ 25 47 93 |
| amboð ge. úr. II&III** | Mánadag | 18.00-19.30 | Komm. skúlin | Anna Maria Troest | 32 02 14/ 26 44 80 |
| amboð ge. úr. II&III** | Mánadag | 18.00-19.30 | Komm. skúlin | Durita Waagstein | 31 94 86/ 25 20 23 |
| amboð ge. úr. II&III** | Mikudag | 18.00-19.30 | Komm. skúlin | Hallfríð Durhuus | 31 17 50 |
| amboð ge. úr. II&III** | Mikudag | 18.00-19.30 | Komm. skúlin | Sámal T. Johansen | 31 17 50/ 22 62 58 |
| HipHop/ funk/ StreetDance | Hósdag | 20.00-21.00 | Sankta fr. skúli | | |
| Dream Team | | | | | |

*) úttøka til hesi lið verður leygardagin 27. september
**) úttøka til hesi lið verður leygardagin 20. september
***) frá 20. oktober 2002 til 15. februar 2004

## Fimleikafelagið Ljósið

| Kostnaður | |
|---|---|
| Børn | 350,00 |
| Pensionistar | 350,00 |
| Amboð 1t. | 350,00 |
| 17 ár & eldri | 500,00 |
| Amboð 1½ t. | 450,00 |
| Foreldur & Børn | 500,00 |
| Motión | 500,00 |
| Avspenning | 400,00 |
| Dream Team | 600,00 |
| Kappingarlið | 400,00 |



- Fyrivarni verður tikið fyri feilum/ broytingum í tímatalvuni
- Tilmelding til liðini verður í Sankta Frans skúla leygardagin 6. september kl. 14.00-17.00
- Íðkaratal á hvørjum liði er avmarkað!
- Gjaldast skal við tilmelding!
- Fimleikurin byrjar mánadagin 8. september